



# Stemningspallur á Vaglinum

## Millum mongu tónleikatiltøkini á ólavsøku verður ein sonevndur Stemningspallur á Vaglinum, ið fer at hýsa bæði tónleiki, sjónleiki og øðrum listarligum innsløgum

Ólavsøkan verður í ár á tremur við tónleikaligum tiltøkum. Eitt av tiltøkunum, sum verður við fyri fyrstu ferð, er ein fólksligur stemningspallur, sum verður settur upp á Vaglinum, so hann spælir niðan móti tinghúsinum. Hetta skal vera ein stemningspallur, sum inniheldur fólka-, popp-, jazz- og kórtónleik, umframt sjónleik og aðrar listarligar framførslur millum annað við Bárði Persson. Spælimenninir, Yggdrasil, Uni Arge, Petur Háberg við Bet You Are William, Tórshavnar Big Band og Eyðun og Terji fara eisini at trína á stemningspallin.

**Hugnaligt og fólksligt**

Pallurin skal ljóða teir báðar ólavsøkudagarnar 28. og 29. juli, og hvørt innslag kemur at vera umleið. 25 minuttir. Rundanum kemur alt tað vanliga, hugnaliga, sum eyðkennir miðbýin á ólavsøku, at vera. So sum pannukøkur, poppkorn og básar av ymsum slag.

– Tað verður fólksligt og hugnaligt við tí endamáli at fáa meira av lívi í býin; at fáa tað tónlistarligu síðuna meira við, tí hon er ein so stórur partur av mentanini, og tað er týdningarmikið at vísa á, sigur Bogi Andreasen, leiðari á Margarinfabrikkini, sum saman við einum av stjórunum í Five Star Entertainment, er høvuðsfyriskipari av tiltakinum.

Tað er Tórshavnar Kommuna, sum stendur aftanfyri nýggja tiltakið.

*Sunneva Háberg Eysturstein*